# Uttan kommunuuppgávur ongin kommunureformur

GUNVÁ VIÐ KELDU



**Bæði tá ið Føroyar vórðu gjørdar til eitt valdømi, og aftur nú ætlanin er at leggja kommunurnar saman í størri eindir, var og er ein høvuðsfortreyt, at fleiri málsøki verða løgd út til kommunurnar - annars verður eingin kommunureformur**

Beinleiðis atvoldin til hesar reglur er útmeldingin frá Javnaðarflokkinum mánamorgunin 19. oktober 2009 í sambandi við málið um nýggja skipan fyri kommunurnar.

Lat meg beinanvegin undirstrika, at hesar viðmerkingar ikki verða gjørdar sum borgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu ella sum næstforkvinna í KSF, men eru mínar egnu.

Eg meti tað sum bæði tiltrongt og neyðugt at gera hesar viðmerkingar, tí viðgerðin av nýggjum bygnaði fyri kommunurnar tykist hava sera lætt við at fara av sporinum.

**Ongar uppgávur = einki endamál**

Eitt av høvuðsendamálunum við øllum hesum tosinum, um at skipa kommunurnar í størri og harvið sterkari eindir, er at flyta fleiri av uppgávunum og málsøkjunum, sum landið í dag umsitur, út til kommunurnar at røkja.

Av royndum vita vit, at kommunurnar eru tær bestu at røkja borgarans tænastur, samstundis sum tær við hesi broyting flyta nærri borgaranum. Hetta er tí ein bati, bæði fyri tænastustøðið og fyri fólkaræðið, at t.d. fólkaskúlin og eldraøkið flyta út til kommunurnar at hava fulla og heila ábyrgd av.

Eisini er hetta ein liður í menningini av nøkrum kommunalum kraftardeplum kring landið, har kvalifiserað starv verða sett á stovn í sambandi við umsitingina av hesum og øðrum málsøkjum.

Samstundis gevur hetta landinum møguleikar at útinna eitt eftirlit og at áseta støði og reglur fyri hesi málsøki – óheft at sjálvari útinningini, sum tá liggur fult og heilt hjá kommununum.

Tað er hetta, sum byrjaði alt hetta tosið um kommunusamanleggingar, og tí gevur tað als onga meining, um politiskir flokkar nú byrja at draga í land í mun til hendan partin.

Tað verður eingin kommunureformur, um ikki málsøkini samstundis verða flutt út til kommunurnar at røkja.

**Burðardyggar kommunur men eisini nærfólkaræði**

Tað undrar meg, at Javnaðarflokkurin meldar út alment um at gera enn størri kommunueindir, enn kommunuálitið mælir til.

Bæði í tí 'grøna' kommunuálitinum, sum varð lagt fram fyri nøkrum árum síðan, og sum eisini varð politiskt góðkent á løgtingi og í landsstýri, og í hesum nýggja kommunuálitinum, sum júst er lagt fram alment, er eitt av grundleggjandi málunum, at samstundis sum vit fáa størri eindir, sum eru sterkari enn verandi smáu eindir, so má eisini havast í huga, at vit varðveita eitt nær-fólkaræði, soleiðis at umsitingin av teimum kommunalu uppgávunum fer fram so nær borgaranum, sum til ber.

Tí skulu vit politikarar vera varnir við at gera eindirnar enn størri, enn hesi bæði kommunuálitini hava lagt upp til. Heldur vil eg mæla til, at vit umvegis javningarskipanir og møgulig kommunusamstørv (eins og á barnaverndarøkinum) tryggja, at eitt nú Sandoyar Kommuna verður før fyri at røkja sínar uppgávur á ein nøktandi hátt.

Vit skulu heldur ikki gloyma, at Sandoy er eitt øki við møguleika fyri menning og vøkstri.

**Ikki umsitingarøki men kommunuøki**

Tað, sum kanska er mest ræðandi í verandi tilgongd, er at síggja, hvussu stóra trongd landsstýri og landsstovnar fyri tíðina hava at umskipa tey málsøki, sum nú ætlast løgd út til kommunurnar.

Ein má spyrja seg sjálvan, hvussu tað ber til, at landsstovnar og avvarðandi aðalráð nú brádliga hava so stóran skund at gera umleggingar, tá ið hesi málsøki kortini ætlast løgd út til kommunurnar at umsita.

Er tað so galið, at hesi aðalráð og stovnar royna at órógva og forpurra ætlaðu útleggingarnar til kommunurnar við at broyta, flyta og umskipa innanhýsis hjá landinum? Eg eri tíverri bangin fyri, at tað er so.

Tí skurrar tað í oyrunum at hoyra Javnaðarflokkin melda út alment, at hann stuðlar ætlanum landsstýriskvinnunnar at skipa landið í skúlaøki, samstundis sum flokkurin sigur, at eldraøkið kann skipast øðrvísi og betri, enn tað er í dag.

Henda útmelding ber brá av, at flokkurin ikki ætlar eina kommunala yvirtøku av hesum málsøkjum, og tí er tað okkara skylda sum kommunupolitikarar at rópa varskó, tí ein umskipan av hesum málsøkjum undir landsins umsiting kann ógvuliga skjótt geva tað úrslit, at einki hendir við hesum í mun til kommunurnar.

Latið okkum nú gevast at tosa um umsitingarøki undir landinum, tí hetta mál snýr seg ikki um at skipa LANDIÐ , men at skipa KOMMUNURNAR í hóskandi støddir kring landið, soleiðis at KOMMUNURNAR verða fult førar fyri at umsita hesi málsøki – nakað, sum tær eru munandi betur fyri at gera, enn landið er. Tað vita vit av royndum.

So: Uttan kommunuuppgávur – eingin kommunureformur!

## Grønlandstíðindi

Kári við Stein

# Nógvur svartkalvi

**Kári við Stein greiðir frá, at meðan tað er lítið av svartkalva undir Føroyum, so er rok í grønlendskum og kanadiskum sjógvi. Hann hevur eisini verið til útróðrar. Tað var ikki minni gott**

**4. oktober**
Polar Amaroq kom til Nuuk at landa í morgun. Skipið er fult hjá teimum.

**5. oktober**
Kanadiarin, fyrrverandi Tasilak, nú Agcatian Gale kom inn í morgun við 750 tonsum av svartkalva. Tað er tað mesta, sum hevur verið í honum. Hann sá eisinu ógvuliga tungur út í sjónum.

**6. oktober**
Sisimiut kom inn at landa, so skjótt sum Agciatian Gale loysti. Teir hava 470 tons inni av svartkalva. Manu er inni í Manitsoq og landar. Har var alt fult hjá teimun, um 480 tons. Polar Princess er í Aasiat og landar. Teir hava fulla last inni.

**7. oktober**
Lómur er inni í Illulisat við 125 tonsum av ísaðum rækjum.

**8. oktober**
Polar Natoralik er í Nuuk og landar, og Qaqqatsiaq kom inn til Sisimiut at landa. Skipið var á tremun. Har slapst ikki meir niður hjá teimun. Natarnaq er í Manitsoq og landar knappa fulla last. Lómur var í Illulisat við gott 90 tonsum av ísaðum rækjum.

**10. oktober**
Krabbaskipið Natoralik kom inn í dag at landa. Teir hava 23 tons av livandi krabba inni.

**11. oktober**
Polar Natarnaq er inni í Aasiat og landar. Har var næstan fult hjá teimum. Polar Aasik hevur landað nakrar ferðir eisini í Aasiat, og tað hevur gingið heilt væl hjá teimum.

**12. oktober**
Ocean Tiger kom inn í morgun. Teir hava gott 300 tons inni. Teir vóru longu lidnir at landa um kl. 18 í kvøld.

**13. oktober**
Akamalik kom inn at landa fyri middag. Teir hava gott 400 tons inni. Lómur er í Illulisat við 122 tonsum. Tórsvík og Vesturland lógu í morgun her. Tað vóru ymisk ørindir sum teir skuldu gera, bunkring og annað, meðan meðan móðurskipið var í Nuuk.

Tórsvík skal ikki vera her longri. Teir skuldu fyrst til Las Palmas og so suður til Gan Canaria leiðina at vera. Vesturland skuldi nokk vera her hjá móðurskipinum einar 2-3 vikur afturat. Veðrið hevur nógv at siga fyri, nær teir gevast var sagt.

**14. oktober**
Akamalik loysti í morgun kl 5 til nýggjan túr.

**15. oktober**
Regina C kom inn í morgun at landa.

**18. oktober**
Tað er hvítt í bakka. Eitt sindur av kava er komið niður í nátt, men kuldin er ikki nógvur. Lómur kom inn til Illulisat í morgun við 102 tonsum. Teir loystu longu aftur seinnapartin til nýggjan túr. Annars var loyvt at skjóta lomvigur aftur frá. 15 oktober, men lítið er at fáa. Eg havi onga sæð enn komið uppá land. Annars søgdu teir á Vesturland, at tað var svart av lomviga úti á 70 fjórðingum úr landi, har teir lógu.

**Rimmar útróðrartúrur**

Eg var sjálvur annar á útróðri herfyri saman við einum kalbaksmanni, Regin Nysted. Tað tók okkum um 6½ tíma at sigla inn í henda fjørð við einum 22 hk Sabb motori. Vit høvdu ein frálíkan túr og fingu allan tann fisk, sum vit vildu hava. Slagið var í lagi. Vit tóku allan fiskin smátt sum stórt. Tann smáa fiskin var til ein av abbasyninum, sum hevur einar 14-15 hundar. Har skal nakað av mati til. Vit høvdu nokk av línu við. Vit høvdu eisini fýra kalvalínur, sum stóðu nátt yvir. Tað gav ongan kalva, men bert nakrar smáfiskar og nakrar uvakkar og so ein havkall. Hann er gott hundafóður, tá ið hann hevur hingið uppi í eina tíð. Tá er alt amoniakkið runnið av.

Eg havi egningatrakt, sum eg sjálvur havi gjørt. Regin hevði ongatíð verið við og sett við trakt.



*Arcadian Gail við 750 tonsum av svartkalva*



*Á útróðri. Fiskur á hvørjum húki*

Hann hevði forsvorið, at hon egndi so gott. Og so ikki at forgloyma veðri inni á botni á einum fjørði sum eitur Orioq, dýrdarveður hvønn dag.

Vit royndu eisini við snellu. Ekkoloddið skrivaði sum eg veit ikki hvat. Har vit royndu vóru gott 70 metrar dýpi. Einar 10-15 metrar upp frá botni var skrift alla tíðina, og snellunar vóru fullar hvørja ferð, tað kom á borðið. Støddin var fínasta slagi. Hjá einum glastrevjabáti við einum 5-6 elektriskun snellum hevði verið nokk at gjørt.

Vit kunna illa avreiða fisk. Kompressarin til frystaríið á flakavirkinum er í ólagi. Tað er altíð okkurt á vási, so tá tað er opið, er avmarkað, hvussu nógv tú kann avreiða. Prísurin er bert knappar 5 kr fyri kilo av avhøvdaðum fiski. Tað skal nakað fyri fyri at fáa úrtøku.

Vit høvdu ein heilt fantastiskan túr. Vit yvirnáttaðu í einum summarhúsi við sólorku til streym. Her var so kvirt, tú hoyrdi um ein knappanál datt á gólv. Ein dani búði saman við okkum. Hann hevði laksagørn við og royndi eisini eftir toski. Hann fekk fimm laksir íalt, og vit fingu hvør sín laks frá honum.